FISKIMÁLARÁÐIÐ

P/F Vorðustíggjur
Att.: Jógvan Páll Lassen, advokatur

jpl@lawfirm.fo

**Stjórnarskrivstovan**
3. desember 2018
Mál: 18/00243-26
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR/TVR

Tygara skriv: 1741802

**Avgerð Fiskimálaráðsins**

Fiskimálaráðið skal hervið vísa til avgerð sína, dagfest 15. nov. 2018, og kunna um, at ásetta treytin, um at fáa viðurskiftini skipað soleiðis, at sum mest av verkætlanini verður gagnnýtt í Sandoynni í seinasta lagi hósdagin 22. nov. 2018, ikki bleiv lokin innan ásettu freist, og sostatt er tilsognin at fiska menningarkvotu í 2018 hervið tikin aftur við virknaði frá nevnda degi.

Tann 19. nov. 2018 hava tygum sett fram ynski, vegna klient tygara, um, at tillutaða menningarkvotan verður sett niður við umleið 20%, og at reiðaríið – heimahoyrandi í Sandoynni – framvegis kann fiska og avreiða tey 80%-ini í Hvalba.

Mett verður ikki, at ein tílík skipan er í samsvari við tær grundleggjandi fyritreytir, ið hava verið avgerandi fyri tilsagnirnar um at veita P/F Vorðustíggi menningarkvotu fyri 2018. Tí sambært avgerðum Fiskimálaráðsins og sambært tilmælinum frá Metingarnevndini, var avgerðin grundað á, at Metingarnevndin metti, at hóast virkisætlanin ikki var fullfíggjað, so taldu tær økisrættarligu treytirnar í Sandoynni somikið nógv, at P/F Vorðustíggjur fekk tillutað makrel og sild í menningarkvotu fyri 2018. Endamálið við skipanini við menningarkvotum er at tryggja vinnuligt virksemi kring alt landið, og tí vigaði økisrættarliga atlitið at landa í Sandoynni sera nógv í metingini av umsóknini frá klienti tygara.
Annars verður sum heild víst til avgerðina, dagfest 15. nov. 2018.

Henda avgerð er endalig innan fyrisitingina, og Fiskimálaráðið ger ikki meiri við málið.

Avrit av hesum brævi er sent Vørn til kunningar.

Blíðar heilsur

Rógvi Reinert
aðalstjóri

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo